# Globalt spæl á alnótini herjar

**Í hesum døgum sita umleið 150 føroyingar umframt 350.000 aðrir persónar kring heimin og royna at vinna pening gjøgnum telduspælið á alnótini, World Games Incorporated. Umframt lutaseðlar og partabrøv ræður um at fáa onnur at luttaka í spælinum, og á henda hátt er møguleiki at vinna pening í stórum upphæddum. - Hetta er ikki eitt pyramiduspæl, sigur Leif Andersen, sum umframt sjálvur at vera virkin hevur stórar ætlanir uttanfyri landoddarnar við hesum spæli**



*Leif Andersen er ein av høvuðsmonnunum fyri WGI í Føroyum, og hann hevur ætlanir um at marknaðarføra spælið í Kanada um 2-3 mánaðir. - Talan er ikki um eitt pyramiduspæl, men heldur "fair play", har hvør limur fær tað, hann hevur uppiborið, hóast talan eisini er um tilvild við lottospølum*

VIRKSEMI Á ALNÓTINI
*Heini í Skorini*

Í apríl 2001 kom australski ríkmaðurin og vinnulívsmaðurin Greg Kennedy á marknaðin við einum nýggjum telduspæli, og breyt hann upp úr nýggjum á hesum øki. Talan var nevniliga ikki um vanligu pyramiduspølini, sum eru ólóglig, men um sokallaða "network marketing", ein háttur, sum fleiri stórar fyritøkur eisini hava nýtt, m.a. Coca Cola og Microsoft. Við hesi metodu verður minimalur peningur nýttur til marknaðarføring av eini vøru, tí endamálið er at fáa brúkarar munnliga at bera boðini víðari um eina vøru ella eitt spæl, uttan at peningur verður nýttur.

Endamálið hjá Greg Kennedy er at fáa World Games Incorporated (WGI) at gerast størsti spælimiðdepil í heimsins størsta miðli, nevniliga alnótini. Eftir sex og porno eru telduspøl næst størsta vøra á alnótini, og tískil verður satsað uppá telduspælið WGI, har møguleiki er at vinna nógvan pening, um ein "bert" er virkin. Samanborið við tipstænastur og vanligt lottarí hevur WGI ein stóran fyrimun á kappingarliga økinum, við tað at eingin peningur verður nýttur til marknaðarføring orsakað av áðurnevnda munnliga marknaðarføringshátti.

Sambært Greg Kennedy loggar ein nýggjur brúkari seg inn á alnótina hvørt sekund, og um hesin vøkstur heldur fram, verða umleið 1 mia. regluligir brúkarar á netinum í 2005, og sum størsti miðilin frammanfyri, útvarp, sjónvarp og bløð er alnótin tað, ein skal satsa uppá.

### Spælið sjálvt - snýr seg um virkni

Stóri spurningurin er, hvussu ein so kann vinna pening í WGI. Fyrst og fremst skalt tú gerast limur gjøgnum onkran, sum longu spælir, og kostnaðurin at byrja er 1500 kr. Við tað at hetta er ein eingangsupphædd, eru hesar 1500 krónurnar tað einasta, tú skalt gjalda. Síðani fært tú egna heimasíðu, loginn og konto, og so snýr tað seg um at fáa yvirtala onnur eisini at gerast limir. So hvørt sum fleiri koma uppí, fært tú ein part av tí upphædd, tey lata, umframt at tú kanst keypa fiktiv partabrøv, lutaseðlar og og spæla kasino.

Stóra misskiljingin er, at tað ikki bert ræður um at vera fyrst og síðani at hava fleiri undir sær í eini hierarkiskari skipan, sum talan er um í áðurnevndu pyramiduspølum. Um tú sjálvur ikki er støðugt virkin, kann ein "undir" tær saktans vinna meiri pening enn tú, um hann fær fleiri fólk uppí spælið og er virkin á partabrævamarknaðinum. Hvør limur hevur tvey bein at standa á, og um talan ikki er um eina vaksandi javnvág, vinnur tú einki. Hvør limur hevur sostatt sítt egna netverk, og júst henda skipan ger spælið rættvíst mótvegis pyramiduspølunum.

Tað snýr seg um at savna sær stig, og meginreglan er, at fyri hvørji 300 stig fær ein limur 425 kr. Fyri hvønn persón, tú fært við í spæli, fært tú 75 stig, umframt at tú eisini fær stig við at keypa lutaseðlar og partabrøv. Um teir persónar, tú fært við í spæli, eisini fáa onnur við, kemur vinningur eisini aftur til tín, men sum sagt er treytin at vinna pening hon, at tú sjálvur støðugt ert virkin uttan møguleikan at fáa fullan vinning gjøgnum onnur.

### Normaður vinnur 100.000 um dagin

Drívmegin aftanfyri spælið er sjálvsagt peningurin, tú kanst vinna. Normaðurin Mats Ostevang er í løtuni tann europearin, sum hevur vunnið mest pening í WGI, og hann fær ikki minni enn 100.000 krónur um dagin. Fyrrverandi norski løgreglumaðurin fekk spælið til Noregs, og higartil hevur WGI havt best gróðrarlíkindi í Noregi. Mats Ostevang fekk beinanvegin 35 aðrar persónar at spæla, og er hann sera virkin viðvíkjandi partabrøvum og lutaseðlum. Hann er eitt sera gott dømi um, at talan ikki er um eitt pyramiduspæl, tí hóast hann er limur nummar umleið 5000, hevur virkni hansara gjørt hann ríkan.

Í løtuni er talan um støðugan vøkstur í Danmark, Onglandi, Svøríki, Íslandi og Føroyum, og jú fleiri luttakarar eru við, jú størri gerst virði á partabrøvum, og jú størri gerast upphæddirnar, ein kann vinna sær.

Teir føroyingar, sum higartil hava verið virknir, vinna í løtuni nakrar túsund krónur um vikuna, men Leif Andersen, sum er ein av oddamonnunum í Føroyum viðvíkjandi umboðan av WGI, ynskir ikki at greiða nærri frá konkretum upphæddum um, hvat hvør fær.

### - Spælið eksploderar, tá USA gerst luttakari

WGI er altjóða góðkent av myndugleikunum, og tískil er hetta spælið lógligt og øðrvísi. Men enn er størsti parturin av Asia ikki við enn, umframt at spælið heldur ikki er komið til USA. Orsøkin er ymsu lóggávurnar í ymsu amerikansku statunum, og í løtuni verður arbeitt av øllum alvi at fáa allar statirnar at góðkenna spælið, og tá tykjast vónirnar verða stórar fyri einum veruligum gjøgnumbroti.

- Jú fleiri spæla við, jú størri gerst virðið á partabrøvunum, og tá USA gerst luttakari, eksploderar spælið uttan iva, sigur Leif Andersen. Hann leggur afturat, at við tað at føroyingar longu nú hava møguleikan at gera seg galdandi áðrenn lond sum Kina, USA, Kanada o.s.fr. er møguleikin stórur at vinna nógvan pening í framtíðini. Í 2002 vuksu partabrøvini frá 2,92 frankum uppá 30 frankar uppá bert seks mánaðir, og virðið er í støðugum vøkstri. Sum mest stabila gjaldoyra í heiminum gjøgnum søguna verður sveisiski frankurin nýttur sum gjaldoyra í WGI.

Leif Andersen, sum hevur arbeitt á telduøkinum í longri tíð, fer um 2-3 mánaðir til Kanada at marknaðarføra spælið munnliga, og jú størri undirtøkan verður í Kanada, jú størri er møguleikin fyri eini amerikanskari innrás seinni í ár. Leif hevur búð í Kanada stóran part av lívi sínum, og tískil veit hann, hvat hann fer til.

### Kann gerast heimsins størsta spælimiðstøð

Sambært Leif Andersen hevur WGI nakrar fyrimunir samanborið við aðrar fyritøkur, og høvuðsorsøkin er júst, at tað fer fram á alnótini.

- Tipstænastan, lottospøl, V4 o.s.fr. hava stórar útreiðslur orsakað av marknaðarføring, meðan WGI ikki verður marknaðarført við lýsingum, plakatum og øðrum. Tískil eru teir førir fyri at bjóða sínum kundum sera góð odds til sera høgar upphæddir. Leif vísir víðari á, at hvønn mánadag eru oddsini 1-1300 at vinna 800.000 kr, og at 35.000 fólk hvønn mánadag fáa vinningar millum 10.000 og 800.000 kr. Eingin annar megnar at bjóða slík odds, og tískil hevur WGI fortreytirnar at gerast størsti miðdepil fyri lottospæli og internet virksemi í heiminum. Júst hetta er visiónin hjá upphavsmanninum Greg Kennedy, og við vindi í seglunum tykist tað vera sannlíkt, at endamálið verður rokkið. Av samlaðu inntøkunum hjá WGI fer 87% aftur til limirnar, meðan vinningurin hjá bakmonnunum er 13%.

### - Einki at missa

Leif Andersen vísir á, at einki er at missa, og at talan er um "fair play".

- Í veruliga vinnulívinum er tað altíð ein stór risiko at gera íløgur í okkurt, tí tú nýtir stórar peningaupphæddir at koma í gongd. Í WGI missir tú í mesta lagi 1500 kr, og tí er talan um minimala risiko. 1500 kr og ein góður vilji er stutt sagt tað, sum krevst, endar Leif Andersen.

Sum rákið er í løtuni, tykist World Games Inc. vera komið fyri at vera, og sambært Leif Andersen eru føroyingar í eini hepnari støðu við nógum møguleikum, við tað at WGI er komið til Føroya áðrenn fleiri av stóru londunum. So má tíðin vísa, hvat WGI í veruleikanum er fyri nakað, og um tað fer at eydnast at hertaka heimin sum global spælimiðstøð.

## Fakta um WGI

Australski ríkmaðurin Greg Kennedy er upphavsmaður til WGI, sum sá dagsins ljós í apríl 2001

Umleið 350.000 persónar luttaka í løtuni kring allan heim

Umleið 150 føroyingar luttaka higartil, men talið er vaksandi bæði í Føroyum og uttanlands

Tú vinnur gjøgnum partabrøv og lutaseðlar umframt at fáa onnur fólk at luttaka

Normaðurin Mats Ostevang hevur higartil havt størst success og vinnur umleið 100.000 kr um dagin

Spælið kann fáa veruligt gjøgnumbrot, tá USA góðkennir WGI og gerst luttakari

Heimasíðan er 1) www.worldgamesinc.com og 2) www.wgifo.com



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kiosk Steinatún opin aftur



*Ivan Hansen rekur nú Kiosk Steinatún í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mánamorgunin kl. 7 lat Kiosk Steinatún í Havn upp aftur eftir at hava verið stongd í umleið fýra vikur. Tað er 29 ára gamli strandingurin, Ivan Hansen, sum nú hevur yvirtikið kioskina. Ivan hevur seinastu trý árini arbeitt á heilsøluni hjá Poul Hansen í Havn, har hann m.a. hevur havt við góðgæti at gera. Ivan sigur, at hann fer at broyta kioskina, so hon verður meira kundavinarlig. Hann hevur longu nú gjørt nakrar smærri broytingar, men eftir ólavsøku verða størri broytingar gjørdar. Kioskin í Steinatúni hevur serliga stóran týdning fyri allar teir mongu borgararnar í býnum, sum dagliga brúka bussleiðina, tað er har tey keypa síni busskort og aðra tænastu, sum hoyrir til bussleiðina. Meðan Kiosk Steinatún hevur verið stongd, hevur hendan tænastan verið á Snarskivuni á Vaglinum. Býráðið eigur hølini, har kioskin húsast. Upp- og afturlatingartíðirnar eru nú broyttar soleiðis: Mánadag-fríggjadag frá kl. 7-22, leygardag frá kl. 8-22 og sunnudag frá kl. 13-22.

## Væl eydnaður Trucker-festivalur í Runavík

**Leygardagin 19. juli 2003 varð skipað fyri stórum Trucker-festivali á havnaøkinum í Runavík. Tað var Leif Eliasen, lastbilaførari í Klaksvík, sum samskipaði tiltakið. Hetta var samstundis fyrsta tiltak av sínum slagi í Føroyum**


*Undirtøkan til Trucker-festivalin varð nógv betur enn væntað. 39 stórir bilar luttóku*


*Klaksvíkingurin Leif Eliasen samskipaði tiltakið*

TRUCKER FESTIVALUR
*Magnus Gunnarsson*

Stórur Trucker-festivalur var í Runavík seinasta leygardag. Tað var 24 ára gamli klaksvíkingurin Leif Eliasen, sum samskipaði tiltakið. Hann arbeiðir dagliga sum lastbilaførari hjá Elmar Zachariasen í Klaksvík.

Endamálið við hesum Trucker-festivalinum var at lastbilaførarar og onnur sum koyra stórar bilar, ið bert møtast og heilsa upp á hvønn annan í ferðsluni, nú kundu møtast, hugna sær saman og tosa um felags áhugamál, meðan bilarnir vórðu sýndir fram.

Tiltakið leyardagin eydnaðist sera væl. Við í festivalinum vóru 39 bilar, sum allir vóru væl vaskaðir og pussaðir upp og tóku seg væl út á havnarlagnum í Runavík. Leif Eliasen sigur, at hann hevði ikki roknað við so stórari undirtøku. Eitt stað millum 80 og 90 fólk komu at vitja festivalin. MC-felagið kom eisini ein túr framvið, har teir vístu fram sínar motorsúkklur. Countrybólkurin spældi undir tiltakinum, og skipað var eisini fyri togtogan.

Fyri at seta ein serligan dám á festivalin varð endað við at allir 39 bilarnir fóru ein túr til Leirvíkar og aftur til Runavíkar, har tað bæði varð floytað og blinkað við øllum ljósum. Hetta er heldur ikki roynt í Føroyum fyrr.

Leif Eliasen sigur, at av tí at undirtøkan var so góð hesuferð, verður allarhelst skipað fyri einum Trucker-festivali aftur komandi ár, og verður tað nokk ein størri festivalur enn hesin. Hann takkar øllum teimum ið møttu upp við bilunum og ikki minst Runavíkar Komunu, fyri at teir stuðlaðu tiltakinum so væl.

## Malla Jacobsen 101 ár

**Í dag fyllir Malla Jacobsen í Svínoy 101 ár. Í samrøðu við Sosialin í fjør, segði Malla, at hóast hon ongantíð hevði verið kedd av lívinum, ynskti hon nú at koma heim, ongantíð ov skjótt. Men Malla er her enn, eins frísk og skemtingarsom sum altíð**


*Í dag fyllir Malla Jacobsen í Svínoy 101 ár. Malla er eins smílandi og glað sum altíð. Myndin er tikin mánadagin.*

*(Mynd: Rúna Sivertsen)*

FØÐINGARDAGUR
*Rúna Sivertsen*

Tann 23. juli 1902 varð Malla Jacobsen borin í heim úti í Svínoy. Mamma Mallu, Amalia Olsen, var ættað úr Svínoy og pápi hennara, Poul Hansen, var úr Nornastovu í Mikladali. Í 1931 giftist Malla við Edvardi Jacobsen, sum eisini var ættaður úr Svínoy. Malla, sum alt sítt lív hevur búð í Svínoy, sigur at henni ongantíð hevur longst burtur av oynni.

Malla og Edvard fingu 4 synir. Teir eru, Bjarni, Helgi, Atli og Ingi.

Tá Malla fylti 100 ár í fjør segði hon eitt nú soleiðis:

- Eg havi havt eitt gott lív, og eg havi ongantíð verið kedd av lívinum, men nú gleði eg meg at koma heim - ongantíð ov skjótt. Eg veit, at tá eg komi heim, fari eg at síggja Jesus fyrst.

Malla sigur, at hon sum smágenta varð vakt av Guds orði, og at hon kom at kenna Harran sum sín persónliga frelsara sum blaðung genta. Frá ungum av, ynskti Malla, at hon kundi vera nakað fyri tey, sum komu til Svínoyar at boða Guds orð.

Mánadagin seinnapartin vóru vit og heilsaðu uppá Mallu. Vit spurdu hana, hvat hon sigur, nú hon ikki er sloppin heim enn.

Skemtingarsom, sum altíð, var Malla kvik at svara, at Gud mundi ikki hava funnið nakran avloysara fyri hana enn.

Vit ynskja Mallu og øllum hennara hjartaliga tillukku á føðingardegnum.

## Dagurin

**23. juli. Appolinaris.** Sigst at hava verið ferðafelagi hjá ápostlinum Pæturi og varð av honum sendur til Ravenna í Italiu sum trúboðari. Her gjørdist hann fyrsti biskupurin, men varð fyribeindur umleið ár 75 av uppøstum heidningum.

22. ella 23. juli byrja **hundadagarnir**, og halda teir á til 23. august. Navnið hava teir eftir stjørnuni Sirius, Hundastjørnuni. Tá ið hon kemur upp á luftina um hetta mundið, stendur hon næst sólini. Fyrsti hundadagurin sigst vera heitasti dagur á árinum, og um veðrið verður annars sagt, at sum tað er fyrsta dagin, verður tað allar hundadagarnar. Í 16. øld fingu dagarnir latínska navnið *Dies Caniculares* (hundahvølpadagarnir), men annars verður hildið, at navnið gongur aftur til gamla Egyptaland. Um tað mundið, tá ið Sirius, Hundastjørnan, kagaði inn í ein glugga í einari av pyramidunum, fór Niláin upp um áarbakkarnar. Tað var sum áður nevnt ein egyptiskur ráðgevi hjá Juliusi Caesar, Sosigenes, sum legði til rættis tann sonevnda julianska kalendaranum. Haðani er so hundadaganavnið komið við í kristnar álmanakkar.